**HJÁLPARIN**

FERÐSLUMERKINGAR

★★★ ★★★
KOYRILÆRARIN
/Benny Ejdesgaard
Fartel: 73 74 75

# Lítla teoribókin

## FERÐSLUSKELTI

**Hesi sløg av ferðsluskeltum eru.**

A. Ávaringarskelti vara við vanda. Tey vera vanliga bert sett á støðum, har trupult er hjá tí ferðandi frammanundan at varnast vandan, ella har hann er munandi størri, enn tann ferðandi kann rokna við.
B. Víkiskylduskelti skila til víkiskylduviðurskfiti.
C. Forboðsskelti seta serlig forboð.
D. Boðsskelti geva serlig boð.
E. Leiðbeiningarskelti skila til onnur viðurskifti av týdningi fyri ferðsluna .

## KUNNGERÐ UM FERÐSLUMERKINGAR

Ferðsluskelti verða sett høgrumegin við veg, sæð tann vegin, ferðslan gongur. Har tað er hóskandi, kunnu tey tó verða sett í miðrás ella vinstrumegin ella verða hongd uppi yvir akbreytini.

Ferðsluskelti hava vanliga gildi fyri alla ferðslu frameftir. Týdningur teirra kann tá avmarkast til bert at hava gildi fyri ferðslu á ávísum farbreytum. Hetta kann verða gjørt týðiliga við pílum, sum vísa niðureftir á upphongdum talvum.

## UNDIRSKELTI

Týdningurin av einum ferðsluskelti kann verða nærri greiddur, avmarkaður ella víðkaður við teksti, tali ella tekni á rætthyrntari talvu undir høvuðstalvuni.

Undirskelti til ávaringarskelti, víkiskylduskelti og forboðsskelti hava hvíta grund. Undirskelti til boðskelti og leiðbeiningarskelti hava bláa grund, samb. tó § 19, skelti E63. (parkering)

Útsjóndin á undirskelti, sum bert vera nýtt saman við ávísum høvuðsskeltum, er víst saman við hesum høvuðsskeltum.

KOYRILÆRARIN
/Benny Ejdesgaard
Fartel: 73 74 75



## A. ÁVARINGARSKELTI

Ávaringarskelti eru tríhyrnt og hava spíska endan uppeftir.
Tey hava reyða rond og hvíta grund við svørtum tekni, sum sigur frá vandanum.

Uttan fyri fjølbygt øki standa ávaringarskeltini vanliga 150 til 250 m framman fyri vandastaðið.
Verður annars fráleiki nýttur, verður hann tilskilaður á undirskelti.

Á fjølbygdum øki kunnu skeltini verða sett nærri vandastaðnum uttan tilskilan av fráleika,



## B. VÍKISKYLDUSKELTI

Víkiskylduskelti verða sett beint har ella haðan, tann tilskilaða víkiskyldan hevur gildið



## C. FORBOÐSSKELTI

Forboðsskelti eru rund. Flest teirra hava reyða rond og svørt tekn, sum lýsa forboðið.
Forboðsskeltið verða vanliga sett beint við tað staðið, har ella haðan forboðið hevur gildi.
Skelti, sum verða sett nakað frá staðnum, hava undirskelti, sum skila til fráleikan,
Um ikki annað er ásett, hevur eitt forboð gildi fram til næsta vegamóti,
um tað ikki frammanundan er avtikið við avtøkuskelti, ella annað boð er givið á undirskelti.



## D. BOÐSKELTI

Boðsskelti eru rund við bláari grund og hvítum tekni, sum lýsir hvat boðið er.

Boðsskelti verða sett beint við tað staðið, har ella haðan boðið hevur gildi



## E. LEIÐBEININGARSKELTI

Hesi skelti eru rætthyrnt. Flest teirra eru blá við hvítum tekni ella hvítum teksti.
Leiðbeiningarskelti verða sett nærindis tí staði ella við byrjan á tí vegastrekki, sum skeltið viðvíkur. Skelti, sum verða sett nakað burturfrá, kunnu hava fráleikan tilskilaðan í neðra ella á undirskelti.

## AÐRAR MERKINGAR



TÆNASTUSKELTI gevur aðrar upplýsingar, sum kunnu hava áhuga hjá tí ferðandi.



JARÐARMERKINGARPLÁTUR verða settar har tørvur er á serligari merking.
Ferðandi skal tí megin sum strípurnar vísa niðureftir



FERÐSLUVITAR eru gular súlur. Teir skila til, at ferðandi skal vera høgrumegin vitan uttan so, at onnur merking loyvir akstur vinstrumegin, ella at vitin er við einvegis akbreyt.

## FERÐSLULJÓS

Hesi sløg av ferðsluljósum vera nýtt:
Ferðsluljós á gøtum verða nýtt til tess at stýra ferðsluna inn á vegamót og um gonguteigar og til tess at stýra ferðsluleiðina á vegastrekkjum við skiftandi einvegis ferðslu.

Farbreytaljós skila til, um ferðsla ávísan veg er loyvd á farbreyt.

Blunkljós skila til steðg ella serligan vanda

★★★ ★★★
KOYRILÆRARIN
/Benny Ejdesgaard
Fartel: 73 74 75

# FERÐSLULJÓS



Reytt ljós krevur steðg. Koyrandi skulu steðga við steðgistriku ella, um eingin steðgstrika er, nóg langt frá vegamótinum ella vegastrekkinum. Gongufólki er ikki loyvt at stíga út á akbreyt ella súklubreyt. Ferðandi, ið eru komin á øki, sum ljósið geldur fyri, skulu um gjørligt fara av tí, gongufólk við at halda fram til næstu gongubreyt, øksl ella ferðsluhólm.



Reytt og gult saman krevja steðg. Tey hava sama týdning, sum reytt ljós einsamalt, men vísa eisini, at ljósið skjótt fer at vísa grønt.



Grønt ljós býður at koyra. Gongufólk kunnu fara á akbreytina og súklubreyt. Fyritreyt er tó, at hetta ikki ber við sær brot móti øðrum ásetingum.



Gult ljós krevur steðg. Tað skilar til, at ljósið skjótt fer at vísa reytt, men hevur annars sama týdning sum reytt ljós. Er koyrandi, tá ið ljósið skiftir frá gørnum til gult, komin so langt,, at hættisligt er at steðga, skal hann ikki steðga.



Ljósið við pílum. Ljósið kann hava op til reyðan, gulan og grønan píl. Tað verður vanliga nýtt í samband við høvuðsljós, soleiðis at ljósop til sama lit eru lið um lið. Ljós við pílum hava gildi fyri ferðandi, sum skulu tann vegin, pílurin vísir.

## LØGREGLUMAÐUR Í KROSSVEGI

Sært tú bringu ella rygg, merkir tað “STEÐGA” (reytt)
– hevur løgreglumaðurin síðuna til tín (uttan at lyfta armin heilt upp) skalt tú koyra.
Grønt: Tá kanst tú koyra beint fram , tú kanst koyra til vinstri og tú kanst koyra til høgru.



| **Reytt** | **Reytt** | **Gult** | **Grønt** |
|---|---|---|---|
| krevur steðg | krevur steðg | krevur steðg | koyr |

# HJÁLPARIN

FERÐSLUMERKINGAR

KOYRILÆRARIN
/Benny Ejdesgaard
Fartel: 73 74 75

## LONGDARMERKINGAR

.

Hesar merkingar á akbreyt verða nýttar eftir longdini á vegnum

### FARBREYTASTRIKA.

Smøl brotin strika við stuttum strokum og longum gloppum. Hon skilir sundur akbreytina í farbreytir. Í vegamóti kann farbreytastrika eisini verða nýtt at stýra ferðslu, sum skal snara.

### VARNINGSSTRIKA.

Smøl brotin strika við longum strokum og stuttum gloppum. Hon er skilnaður illum farbreytir og varar eisini ferðandi við, at serliga væl skal ansast eftir, um farið verður um strikuna. Varningsstrika boðar frá, at komið verður til hindrunarstriku, og verður annars serliga nýtt á smølum vegi við vánaligum útsýni.

### HINDRUNARSTRIKA.

Smøl óbrotin strika. Hon er skilnaður millum farbreytir, og tað ikki loyvt at fara um hana við nøkrum hjóli, heldur ikki tá vent verður, snara á vegamóti, koyrt inn á ogn við vegin ella tílíkt. Har  óvanlig viðurskifti, t.d. vegarbeiði ella óregluliga steðgað ella parkerað akfar, gera tað neyðugt, kann tó verða farið um strikuna, um serliga væl verður ansað eftir.

### SAMEINDAR STRIKUR.

Strikurnar kunnu verða nýttar einsamallar ella tvær og tvær saman. Har tvær strikur eru lið um lið, skal tann akandi rætta seg eftir tí strikuni, sum er nærri akfarinum. Ferðandi, sum koyrir á farbreyt fyri mótvegis ferðslu, hevur tó altíð loyvi at koyra aftur á egna farbreyt.

### SKÁKATEIGUR.

Skákastrikað ella heilt hvítt øki á akbreytini, sum ikki er loyvt at koyra, steðga ella parkera á. Er partur av striku um skákateig brotin, er loyvt snarandi ferðslu at koyra tvørtur um teigin har. Farast skal fram við skákateigi teirri megin, har sum skákastrikurnar vísa frameftir.

★★★ ★★★
KOYRILÆRARIN
/Benny Ejdesgaard
Fartel: 73 74 75

# LONGDARMERKINGAR

## ÓBROTIN MARKNARSTRIKA.

Óbrotin strika, sum avmarkar tann partin av vegnum, sum er akbreyt. Hon kann eisini verða nýtt til at skilja vanliga farbreyt frá serligum farbreytum. Óbrotna marknastriku má ikki verða farið um við motorakfari, uttan tá steðgað ella parkerað verður, ella tá koyrt verður inn á vegin ella út av honum. Akandi, sum koyra spakuliga, kunnu tá ástyttristrekki fara um óbrotna marknastriku, um tað gert neyðugt til tess at gera tað lættari hjá øðrum akfari at sleppa framum, smb. § 31,3, stk. Í ferðslulógini.

## BROTIN MARKNARSTRIKA.

Brotin strika við javnlongum strokum og gloppum. Hon verður nýtt ístaðin fyri óbrotna marknastriku til tess at vísa á, at loyvt er at fara um strikuna, um tað ikki brýtur aðrar reglur.

Viðvíkjandi óbrotin marknastrika og brotinmarknarstrika: Strikan er breið, har vegøki uttan fyri strikuna er nóg breitt til at kunn verða nýtt av gongufólki, súklufólki og tílíkum, annars smøl..

Til sundurskiljing av gøtu í breytir til ymisk sløg av ferðslu ella ymiskar ferðsluleiðir verður nýtt smøl óbrotin ella brotin strika. Óbrotna striku er í vanligum umstøðum ikki loyvt at fara um.

★★★ ★★★
KOYRILÆRARIN
/Benny Ejdesgaard
Fartel: 73 74 75

# PÍLAR

Hesi sløg av pílum vera nýtt á akbreyt

## FARBREYTAPÍLAR.

Beinir ella boygdir pílar á farbreyt við ella á vegamóti. Akandi, sum nærkast vegamóti á farbreyt við píli, skal koyra tann vegin, sum pílurin vísir. Í vegamóti kann pílur nýtast til at vísa, hvar akfarið skal vera í snaring.

## DUPULTIR FARBREYTAPÍLAR.

Pílarnir hava gildi í tveimum vegamótum, sum eru hvørt aftan á annað.

## FARBREYTAPÍLAR VIÐ SNARINGARFORBOÐI.

Pílarnir hava gildi fyri vegamót, sum kemur aftaná síðuveg, sum tað ikki er loyvt at snara inn á.

## PÍLAR TIL FARBREYTASKIFTING.

Skákpílar í gloppunum í brotnari striku. Teir siga, at akandi so skjótt, til ber, skulu fara á tá ta farbreyt, sum pílarnir vísa á, sbr. § 29, 2. stk. í ferðslulógini

## GULAR STRIKUR.

Gular strikur á vegnum taka yvir valdið á teimum hvítu strikunum sum eru langs vegnum og tær eru sostatt “heilt burtur”. Tað er sum oftast í samband við vegarbeiði at umstøðurnar eru so at vegmyndugleikarnir mála gular strikur omaná tær hvítu sum eru á vegnum - eisini á hindursøkið – men minst til at steðgistrika og gonguteigur eru undantikin og sostatt tí ikki eru “burtur”.

**HJÁLPARIN**

FERÐSLUMERKINGAR

Útgevari og skriva:
KOYRILÆRARIN
/Benny Ejdesgaard
Tel.: (+298) 737475
Box 133
110 Tórshavn

www.koyrikort.fo